## Danskir læknar til Noregs

Norska heilsuverkið hevur ikki nóg nógvar læknar og hevur tí lagt seg eftir at fáa danskar læknar til Noregs at arbeiða. Norska læknafelagið sigur, at tað stendur ikki á at fáa fatur á donskum læknum. Tað kann ljóða sum tann øvugta verð, tí læknatrot er í Danmark, men sambært fjølmiðlunum er norska lønartilboðið so gott, at læknarnir kunnu ikki annað enn taka av. Norsk bløð skriva, at teir donsku læknarnir fáa upp í 55.000 norskar krónur fyri at arbeiða eina viku í Noregi. Higartil hava meiri enn 400 danskir læknar tikið av tilboðnum.



## Dýrt at vraka Icesave

Tað fær stórar búsksparligar avleiðingar fryri tað íslendska samfelagið, um íslendingar vraka Icesave-semjuna, tá fólkaatkvøða verður um fýra vikur. Tað skrivar íslendski professarin Þórólfur Matthíasson í grein í norska blaðnum Aftenposten. Hann heldur tað vera sannlíkt, at rentan í Íslandi fer at hækka tvey ella trý prosentstig, og at íslendsku rentuútreiðslurnar til umheimin fara at veksa millum seks og 10 prosent av bruttotjóðarframleiðsluni tey næstu 15 árini. Þórólfur Matthíasson heldur, at Noreg kann fáa ein týðandi leilut sum semingsland í Icesave-trætuni.

# Gott útsýni til sølu í Sandavági

**Vága kommuna hevur nú boðið ikki færri enn níggju grundøki alment til sølu í Sandavági og Miðvági. Eitt teirra hevur sera gott útsýni yvir Føroya vakrastu bygd**

BÚSETIN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Nógv vilja búseta seg í Sandavági. Nú ynskir kommunan at enn fleiri gera tað*

**Sandavágur:** Um tað eru tær búskaparligu niðurgangstíðirnar, skal vera ósagt.

Í øllum førum er greitt, at Vága kommuna hevur fleiri grundøki til sølu. Og nú ætla tey altso at sleppa av við tey.

Talan er um íalt níggju grundøki, harav átta teirra eru í Sandavági.

Støðan við søluni er vorðin aktuell, nú arbeiðsgevarar í kommununi hava søkt um at fáa tvey grundøki til keyps í Sandavági.

Grundøkini liggja í kostnaði frá 52.000 og upp í 183.000 krónur.

### Bíligt útsýni

Í báðum bygdum í Vága kommunu er rættiliga nógv bygt tey seinastu árini.

Fleiri øki eru seld, og at fólk veruliga hava havt tørv á at seta føtur undir egið borð, sæst aftur í øllum teimum nýggju húsunum, sum síggjast á báðum bygdunum.

Hjá kommununi hava fleiri fólk sent inn umsókn um grundøki, men óivað hava broyttu fíggjarligu útlitini fingið fólk at bíða eitt sindur við at gera brúk av hesum umsóknum.

Til tess at finna útav, hvørt tann veruligi tørvurin er, fer kommunan nú at senda eitt skriv til øll tey sum standa á bíðilista til grundøki.

Á bygdaráðsfundi í farnu viku var hetta málið til viðgerðar, og tá varð samtykt, at øll hesi tøku grundøkini skulu lýsast alment til sølu.

Tað kann hugsast, at serligur áhugi fer at verða fyri tí eina økinum í Sandavági. Hetta økið liggur á Ovastu Hjøllum og haðani er frálíkt útsýni yvir bygdina, vánna og víðari suðureftir.

Tann ella tey sum ynskja sær hetta grundøkið, sleppa rættiliga bíliga.

Sambært yvirlitinum frá Vága kommunu kostar hetta økið einans 52.300 krónur.

# Hestbáturin fiskar væl

**Tað gongur væl við snelluni hjá Ebba Rasmussen úr Hesti. Hann eigur snellubátin "Andromedia"**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hestur:** Hóast Ebbe er komin væl til árs, so leggur hann kortini stóra orku í at røkja áhugamál og vinnuveg sín - útróðurin.

Hesin vinnuvegurin hevur altíð havt hansara áhuga, og tá ein tosar um hann og bát hansara, verður altíð tikið til, at hann fiskar væl.

Teir sum vanliga eru til útróðurs í Hestfirði og í Skopunarfirði síggja javnan Andromedia við Ebba umborð royna við snelluni á hesum kendu fiskistøðunum.

Hetta sama prógvaði hann aftur í hesi vikuni, tá teir mánamorgunin seldu til uppboðssøluna í Sørvági.

Veiðan varð løgd upp í Miðvági, og vá 1942 pund.

Sambært Sandoyarportalinum var meginparturin av veiðuni toskur.

Andromedia er ein Aqua Star-bátur, sum varð bygdur á Guernsey í 1982. Báturin kom út í Hest 20 ár seinni, og varðveitti navnið. Í 2008 varð báturin longdur og fekk annan motor.

### Drívur á

Ein treyt fyri at bátarnir sleppa til útróðrar er sjálvandi veðrið - og streymurin.

Streymurin var harður um vikuskiftið, men er nú avtakandi. Hetta forðaði kortini ikki Ebbe Rasmussen at leggja frá landi og avreiða mánadagin í Miðvági.

Annars er tað serstaka við Andromedia, at báturin hevur eina heimasíðu, har til ber at fylgja við, hvussu gongst við veiðuni.

Um ein hyggur eftir hesi heimasíðuni sær ein, at Andromedia hevur avreitt fýra ferðir í ár, harav tvær ferðir í Miðvági og eina ferð í Leirvík.

Fyrstu ferð teir seldu til uppboðssøluna var 2. januar. Henda dagin høvdu teir 510 pund, og mánadagin 10. januar løgdu teir 4000 pund av upsa upp á land í Leirvík.

Síðani tá er streymurin harðnaður, og ikki fyrrenn leygardagin 23. januar avreiddu teir 1300 pund av toski í Miðvági. Og mánadagin vóru teir aftur.



*Aldurin hevur lítið at týða fyri Ebba Rasmussen, sum her er avmyndaður umborð á útróðrarbáti sínum "Andromedia"*

*Mynd: Sandportal.fo*